**Dimmalætting**

Stovnað 1878
*Ábyrgdarblaðstjóri:* Beate L. Samuelsen
*Blaðstjóri:* Georg L. Petersen
*Útgevari:* P/F Dimmalætting
*Prent:* Dimmalætting

AVGREIÐSLA: Manad. til hosd. kl. 8.00-17.00. Friggjad. kl. 8.00-16.00. Leygard. stongt. Tlf. avgreiðsla kl. 8.00-16.00. Tlf. 311212. Fax: 310941. Smyrilsvegur 13, Postboks 19, FO-110 Torshavn.
*e-mail:* redaktion@dimma.fo, prent@dimma.fo, lysing@dimma.fo, haldari@dimma.fo, bokhald@dimma.fo, kronikk@dimma.fo, vidskerin@dimma.fo

**INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR**

| | Tysdagsblaðið | Mikudagsblaðið | Hosdagsblaðið | Friggjadagsblaðið | Leygardagsblaðið |
|---|---|---|---|---|---|
| Størri lýsingar | frí. kl. 12 | mán. kl. 12 | týs. kl. 12 | mik. kl. 12 | hós. kl. 12 |
| 2 tg. tekstlýsingar | má. kl. 10 | týs. kl. 10 | mik. kl. 10 | hós. kl. 10 | frí. kl. 10 |
| Okkara Gulu | frí. kl. 15 | | týs. kl. 15 | | hós. kl. 15 |

Lýsingar, ið nógv arbeiði er av, mugu vera inni í góðari tíð.
Litlýsingar og lýsingar við framíhjáplássi skulu bíleggjast í góðari tíð.

**Vanligar treytir:** Síðustødd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4.160 mm. Útsjónd: Lýsingar, sum eftir blaðsins meti kunnu mistakast fyri blaðtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður roknað uppi lýsingarmátið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru.

**Fyrivarni:** Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi lógum. Ábyrgdina fyri hesum hevur lýsarin. Blaðið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum blaðið metir óynsktar.

Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at blaðið má tilskila sær rætt til at

1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkir.
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað. Litlýsingar kunnu bert takast við, um tekniskú viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavsláttur eftir blaðsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella líknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vánaligum lýsingartilfari hevur blaðið onga ábyrgd av.

Lýsingar, sum verða inntelefoneraðar, verða altíð lisnar uppaftur, og blaðið tekur tí onga ábyrgd fyri villur, sum koma á henda hátt.

# *Ikki bæði í posa og sekk*

TRUPULT er at fáa samanhang í øllum tí, sum landsstýrið hevur sett sær fyri í hesum loysingarskeiði sínum.

Samstundis sum fólk skulu indoktrinerast í loysingarpolitikkin til bert at halda, at eitt fullveldi er einasta komandi gongda leiðin fyri Føroyar og føroyingar, har eingin annars skal gera av, hvat vit skulu halda ella gera, uttan nakrir fáir greidligir tjóðveldismenn, hevur Tjóðveldisflokkurin fingið fólkaflokslandsstýrismannin í vinnulívsmálum at liggja á knøunum fyri danska ferðslumálaráðharranum.

Henda knæboyggjan fór fram týsdagin, tá heitt varð á danska ferðsluráðið um at útbyggja flogvøllin í Vágum fyri milliónir og aftur milliónir av krónum. Hetta fyri at vøllurin kann verða grýtuklátur hjá okkum, tá vit einaferð gera av at yvirtaka vøllin, allan sum hann er, ávísan skeringsdag.

Og sjálvandi skal hetta fara fram, tá tað passar okkum, sambært landsstýrismanninum í fullveldismálum um yvirtøkur.

Tað er sannroynd, at ferðslan loftvegis økist í hvørjum. Har lenda og fara flogfør, á tremur við ferðafólki, fleiri ferðir um dagin.

Og tá hava vit ikki tikið smærri privatflogførini við, sum nærum dagliga eru gestir her í einum hvørjum ørindum, antin tað eru handilsørindi, ella tað er fyri at fylla tangarnar upp og síðani halda leiðina fram.

Loftferðslan fer at økjast munandi í komandi tíðum, siga teir, sum skil hava fyri hesum. Tí er tað av týdningi at hava ein flogvøll, sum er heilt nútímans í allar mátar. Vit mugu jú hava í huganum, at oljan kann koma at gerast ein kollvelting í søgu okkara, um hon er har.

Men hóast oljan ikki er har, hevur flogvøllurin longu nú fingið ein stóran týdning í sambandi við tær leitingar og kanningar, sum gjørdar verða á havleiðum okkara.

Vit kunnu undir ongum umstøðum bara lata standa til og sleppa flogvøllinum upp á fjall, tá føroyska samfelagið skal til at sleppa sær úr ríkisfelagsskapinum, so sum samgongan hevur sett sær fyri og arbeiðir við »full drøn« fram ímóti.

Fáa vit fullveldi nú ella heilt skjótt, fer flogvøllurin at forfalla vegna vantandi viðlíkahald. Tí hví skal danska stjórnin átaka sær hesar fíggjarligu eyka byrðar við at víðka um vøllin, ein milliónaíløgu, sum danir skulu gjalda, og vit skulu hava ágóðan av, um so er, at Føroyar allíkavæl fyrr ella seinni sjálvar vilja taka yvir vøllin og reka hann.

At gera tað og so samstundis halda, at stjórnin vil seta milliónavís av krónum í ein føroyskan flogvøll fyri síðani at lata okkum hann, er ein hugsan, sum bert tjóðveldisfólk kunnu liggja fyristilla sær.

Um støðan var hin mótsetta, og Føroyar áttu flogvøllin í Kastrup, høvdu vit neyvan gjørt meiri enn hægst neyðugt av íløgum, um í heila tikið nakra, fyri síðani at siga við danir: Gerið so væl. Eigið tit vøllin.

At Fólkaflokkurin í landsstýrinum gongur við til at lata ein av sínum landsstýrismonnum koma í eina slíka støðu sum hana, honum var fyri í samráðingunum við danska ferðslumálaráðharran fyrst í vikuni, er at lata seg hála eftir halanum við í fullveldisrákið uttan ans fyri, at tað er ein part av landsins veljarum, flokkurin skal eitast fyri at umboða.

## Tøkkir

**Tøkk**

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, omma og vermamma okkara

***Katrina Djurhuus***

doyði og varð jarðað. Tøkk fyri kransar, blómur og aðrar heilsanir, og tøkk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
*Asa og Tollakur*




## Viðmerkingar

# Er Javnaðarflokkurin á veg inn í fullveldisbátin?

Í oddagrein týsdagin skrivar Sosialurin: »Tað var meðan Edmund Joensen var løgmaður, at málið um framtíðarstøðu Føroya var á skránni fyrstu ferð. Tjóðveldisflokkurin legði málið fyri tingið. Undir viðgerðini kom eitt broytingaruppskot frá Javnaðarflokkinum um setan av stjórnmálanevnd, sum skuldi greina ríkisrættarligu viðurskiftini.

Við hond og fót stríddust sambandsmenn ímóti, tí ríkisrættarligu viðurskiftini skuldu ikki nertast. Løgmaður setti samgonguflokkunum (Javnaðarflokkurin var ein teirra) stólin fyri hurðina, at var málið nortið varð samgonguslit.«

Tað er júst ein mánaður síðani Sosialurin á sama stað brigslaði Sambandsflokkinum at hava lagt veto móti uppskoti Javnaðarfloksins um at seta eina stjórnmálanevnd.

Nú kann tað vera, at oddagreinskrivarin ikki minnist, at í samgonguskjalinum, sum Javnaðarflokkurin undirskrivaði 10. september 1994, m.a. stendur: »Broytingar í ríkisfelagskapsviðurskiftunum kunnu bara verða gjørdar í fullari semju millum samgonguflokkarnar.« Javnaðarflokkurin legði undir viðgerðini av tjóðveldisuppskotinum, Framtíðarstøða Føroya, fram uppskot um at seta nevnd sambært § 27 í Tingskipanini at fyrireika viðgerð av statsrættarligu støðu Føroya. Hetta varð gjørt, uttan at talað var orð við samstarvsflokkarnar. Sostatt var hetta greitt brot á samgonguavtaluna.

Gamaní stakk Javnaðarflokkurin halan millum beinini í juni 1996 og rýmdi úr samgonguni. Seinast í september legði Javnaðarflokkurin sama uppskotið aftur fyri tingið, nú kallað: Fyrireiking til setan av stjórnmálanevnd. Eitt visti Javnaðarflokkurin, ið hvussu so er, og tað var, at Sambandsflokkurin fór ikki at taka undir við einum slíkum uppskoti.

Tað var eisini ein grov provokatión móti Sambandsflokkinum at seta slíkt uppskot fram og fáa tað samtykt saman við andstøðuflokkunum, meðan Sambandsflokkurin sat við leiðsluni av landsstýrinum, og tað er uppaftur grovari ferð aftan á ferð at brigsla Sambandsflokkinum, at hann ikki tók undir við einum loysingaruppskoti frá Javnaðarflokkinum.

Tá ið Javnaðarflokkurin fyri einum ári síðani legði fram uppskot fyri løgtingið um at seta eina *stjórnarskipanarnevnd*, sum skuldi kanna og viðgera spurningin um broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftum Føroya, tók Sambandsflokkurin undir við uppskotinum av fullum huga, tí tað uppskotið hevði tann fyrimun, at tað læt allar møguligar loysnir standa opnar. Tað var ikki sum hini, har endaúrslitið var givið upp á forhond.



Oddagreinin endar við at siga, at Sambandsflokkurin nú er komin við sínum Nýskipanaruppskoti um dagføring av heimastýrisskipanini, og *»Samgongan eigur at leggja sær hetta í geyma – og heldur royna at finna eina breiða semju – sum fær Javnaðarflokkin, Miðflokkin og kanska enntá Sambandsflokkin við.«*

Tann alráðandi politikkurin hjá samgonguni er at fáa fullveldi. Eftir øllum at døma er Javnaðarflokkurin altráur eftir at sleppa upp í eina breiða semju saman við samgonguni at fremja loysing. Men Javnaðarflokkurin kann vera æviga forvissaður um, at Sambandsflokkurin fer ikki upp í handa bátin, tí Sambandsflokkurin heldur fast við at varðveita ríkisfelagsskapin og at varðveita vælferðarsamfelagið.

Sambandsflokkurin hevði annars væntað, at Javnaðarflokkurin meinti tað, tá ið hann hevur sagt, at hann ynskir at varðveita ríkisfelagsskapin, men nú letur til, at tað eru tær beru lótir.

**Eilif Samuelsen**

# *Tillukku við barninum*

*Hvønn leygardag ynskir Dimmalætting foreldrum tillukku við litla barninum, annaðhvørt bara í teksti ella í teksti og myndum. Hetta gera foreldrini sjálvi av. Send brævbjálvan til Dimmalætting, postboks 19, 110 Tórshavn merkt »Tillukku við barninum«, skriva avsendara, navn og adressu, so vit kunnu senda myndina aftur sum skjótast. Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi friggjamorgun. Um foreldrini ynskja tað, kann myndafólk frá blaðnum taka myndina ókeypis. Ring 311212, og vit avtala nærri.*






**Veitst tú, at**
– Barna- og Ungdómstelefonin svarar hvønn mánadag millum kl. 16 og 18.
– Telefonin er 10645
– Foreldur eisini kunnu ringja og fáa ráðgeving.
– Tey, sum svara, hava tagnarskyldu.
– Tú kanst vera anonymur.

**Hvat kanst tú ringja um**
– Persónligar trupulleikar av øllum slag, t.d. incest, anorexia el. bulimi, alkohol, fyribyrging, royking ella bara hava brúk fyri at tosa við onkran vaksnan.




## Orðið



*Les Dániel 4,18-37*

**LIVA SUM DÝR**

*Táið maður doyr, livnar hann tá upp aftur.*
*– Dániel 14,14*

60 ÁR liðin og 6 milliónir vitjandi, nú djóragarðurin í Milano í Italia bleiv afturlatin. Djóravinir høvdu mótmælt, at viðurskiftini í djóragarðinum vóru ikki dýrunum verdig, ið har vóru. Men valla vóru dýrini útfarin, fyrrenn heimleys fólk tyrptust inn. Áðrenn býarstýrið legði uppí, høvdu hundraðtals sníkt seg inn í búrini í myrkrinum at leita sær náttarhvíld. Tað var lagnunnar speisemi, at djóragarðurin var bara 5 minutta gongd frá einum tí dýrasta keypsdepli í Europa. Bara 350 metrar frá búrunum vóru fram við øllum vegjaðaranum handlar við italskum mótasniði; teir drógu múgvandi oyðiland til sín úr heiminum øllum.

Tað hongur okkurt óhugnakent yvir fólki, ið liva sum dýr. Men hvør var fjarari frá mynd Guds – tey, sum funnu sær lívd í djóragarði, ella ríka oyðilandið fáar teigavíddir haðani?

Máttmikli Nebukadnezar kongur varð ávaraður í dreymi, at hann fór at eta gras saman við dýrunum, uttan so at hann broytti stoltu, syndafullu leið sína. Dániel profetur bað hann halda uppat at synda og sýna fátækum miskunn (4,27). Men Nebukadnezar sýtti, og náttarmarran gjørdist veruleiki.

Faðir, fyrigev hugmóð okkara. Hjálp okkum ikki at liva sum dýr, men at fagna fólki skapt í mynd Tínari.

© -prp-